# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## LEIÐSLUMENNING
Útbúgving 2007

### Diplomleiðaraútbúgving hold 6
**320 tímar, byrjar 27. september, kl. 09.00-16.00**
**Hví brúka dýrabara tíð til hugsaðar støður og trupulleikar, tá tú ístaðin kanst brúka tín egna arbeiðsdag sum case?**
Á diplomleiðaraútbúgvingini fært tú ikki bert lærdóm inn í høvdið. Okkara grundregla er, at tú samstundis tekur støðu til nýggju vitanina og síðani brúkar hana á arbeiðsplássinum, har tú dagliga starvast sum leiðari. Við øðrum orðum: Diplomleiðarar sleppa í lestrartíðini at broyta teori til praksis.

Útbúgvingin verður roknað sum ein góð barlast hjá leiðarum - serliga teimum, sum hava arbeitt við leiðslu, men enn ikki hava nomið sær eina útbúgving innan starvsfólkaleiðslu.
**Tilmelding: áðrenn 13. september 2007**

### Grundleggjandi leiðaraútbúgving hold 10
**96 tímar 23; 24; 30. apríl 1; 2. mai 18; 19. juni 20; 21; 22. aug. 17; 18. sept. kl. 09.00-16.00**
Útbúgvingin vendir sær til nýggjar og komandi leiðarar. Vilt tú hava eitt størri leiðslufakligt støði, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Royndir leiðarar, sum hava fingið nýggjar arbeiðs- og leiðslufunktiónir kunnu eisini taka hesa útbúgving.
**Tilmelding: áðrenn 16. apríl 2007**

### Grundleggjandi leiðaraútbúgving, hold 11
**96 tímar 15; 16; 17. jan. 5; 6. feb. 5; 6; 26; 27; 28. mars. 23; 24. apríl**
Holdið er fullteknað.

### Grundleggjandi leiðaraútbúgving hold 12
**96 tímar 24; 25; 26. sept. 22; 23. okt. 12; 13. nov. 10; 11; 12. des. 14; 15. jan. 2008**
**Tilmelding: áðrenn 10. sept. 2007**

### Grundleggjandi projektleiðaraútbúgving hold 9
**48 tímar 5; 6. feb. 8; 9. mars 16; 17. apríl, kl. 09.00-16.00**
Arbeiðir tú við projektum, ella ert tú projektleiðari, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Skift verður ímillum modul, sum vara 2 dagar og heimauppgávur, sum taka støði í tínum egnu projektum, og sum samantvinna teori og praktiskt arbeiði.
**Tilmelding: áðrenn 22. januar 2007**

### Coaching hold 6
**24 tímar 19; 20. apríl 23. mai , kl. 09.00-16.00**
Seinastu árini er vorðið alt greiðari, hvussu umráðandi tað er, at leiðarin kennir coach-amboðini.
Við tí professionellu samrøðuni sum amboð lærir leiðarin at arbeiða tilvitað við menning av sínum starvsfólkum. Øll kunnu læra at gerast ein góður coach.
**Tilmelding: áðrenn 5. apríl 2007**

### Coaching hold 7
**24 tímar 1; 2; 24. okt., kl. 09.00-16.00**
**Tilmelding: áðrenn 15. sept. 2007**

### Persónlig førleikamenning hold 3
**24 tímar 2; 3. mai. og 8. juni, kl. 09.00-16.00**
- Hevur tú skil á tínum egnu sterku síðum?
- Hevur tú eina mynd av, hvussu onnur uppliva teg?
- Sjálvsálit í tín virkisstíl og førleikar økir um tín møguleika at virka betur.

Skeiðið gevur tær eina mynd av tínum persónligu førleikum og hvørja atferð ein oftast velur - og íblástur, ítøkilig amboð og persónliga sparring til virkni og menning.
**Tilmelding: áðrenn 18. apríl 2007**

### Innanhýsis skeið
Innanhýsis skeið verða skipað í tøttum samstarvi við kundan. Fyrimunir við innanhýsis skeiðum eru m.a., at kundin hevur møguleika sjálvur at velja evni, tíð og stað
- undirvísingin er tillagað tørvin hjá luttakarunum, stovninum ella fyritøkuni
- uppgávur og dømi frá gerandisdegnum verða nýtt
- innanhýsis skeið eru bíligari fyri hvønn luttakara

**Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

TEAM85

**Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn**
**tel 318813, Fax 313374,**
**info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo**

# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Skeið innan almenna fyrisiting
várið 2007

### Fyrisitingarlógin/Málsviðgerð o.a.
**Tíð: 29; 30. januar 2007, kl. 09.00-16.00**
Málsviðgerðarreglurnar í Fyrisitingarlógini verða viðgjørdar:
- Lógarøki hvat fevnir fyrisitingarlógin um? - Reglurnar um vegleiðing, umboðan og ógegni
- Partshoyring, rætturin at geva ummæli, grundgeving, kæruvegleiðing
- Tagnarskylda, avhandan av trúnaðarligum upplýsingum - Reglurnar um partsinnlit

**Tilmelding: áðrenn 14. januar 2007**

### Starvsfólkafyrisiting
**Tíð: 12; 13; 14. februar 2007, kl. 09.00-16.00**
Nortið verður við teir 4 høvuðstættirnir í starvsfólkafyrisiting, sum eisini eru grundarstøði í starvsfólkapolitikkinum:
- **Setan** - hvussu verður rætti persónurin funnin til eitt starv
- **Fasthaldan** - hvussu verða nýsett starvsfólk móttikin, hvørjar arbeiðsumstøður verða bjóðað teimum
- **Menning** - týdningurin av støðugari førleikamenning og hvussu hon kann verða skipað
- **Fráferð** - hvussu verður ein góð fráferð úr starvi skipað, óansæð um starvsfólkið sjálvt velur at fara úr starvi, ella neyðugt av einari ella aðrari orsøk er at siga starvsfólkið upp.

**Tilmelding: áðrenn 1. februar 2007**

### Alment innlit
**Tíð: 19. februar 2007, kl 09.00-16.00**
Innlitslógin verður viðgjørd og útgreinað. Hetta fevnir m.a. um:
- Lógarøkið - hvat er fevnt av lógini? - Skjalahugtakið sambært innlitslógini
- Skyldan at skriva upp - Rætturin til skjalainnlit
- Tagnarskylda - avmarking av rættinum til innlit
- Avgerðin - fráboðan, grundgeving og kæruvegleiðing

**Tilmelding: áðrenn 4. februar 2007**

### Málrøkt og talgild journalskipan
**Tíð: 19; 20. mars 2007, kl. 09.00-16.00**
Endamálið við skeiðnum er at fáa innlit í málsgongdir, frá tí mál tekur seg upp, til tað er liðugt viðgjørt. Greitt verður eisini frá ymsum fyribrigdum, ið lætta um og samstundis tryggja eina góða málsgongd. Eisini verður nortið við, hvussu mál verða varðveitt á besta hátt, so at innihaldið ikki fær skaða ella verður burtur.
Skeiðið fevnir um:
- Samspæl millum journal og málsviðgerð
- Dagligar mannagongdir - eftirstøðueftirlit
- Lógarkrøv arbeiðsgongdir fysisk málrøkt

**Tilmelding: áðrenn 5. mars 2007**

### Persónsupplýsingarlógin
**- og persónsdátuvernd á arbeiðsplássinum**
**Tíð: 21; 22. mars 2007, kl. 09.00-16.00**
Greitt verður frá skyldum og rættindum í starvsviðurskiftum, tá tað snýr seg um skráseting av persónsupplýsingum.
Lógin verður gjøgnumgingin. Dømi verður tikin frá donskum og norskum viðurskiftum og avgerðir í dátueftirlitið teirra.Útgangsstøði er Persónsupplýsingarlógin, hugt verður eisini at aðrari lóggávu á økinum t.d. revsilógini, javnstøðulógini og mannarættindasáttmálanum.
**Tilmelding: áðrenn 8. mars 2007**

### Innanhýsis skeið
Innanhýsis skeið verða skipað í tøttum samstarvi við kundan. Fyrimunir við innanhýsis skeiðum eru m.a., at kundin hevur møguleika sjálvur at velja evni, tíð og stað
- undirvísingin er tillagað tørvin hjá luttakarunum, stovninum ella fyritøkuni
- uppgávur og dømi frá gerandisdegnum verða nýtt
- innanhýsis skeið eru bíligari fyri hvønn luttakara

**Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

TEAM85

**Marknagilsvegur 75, Postsmoga 3239, 110 Tórshavn**
**tel 318813, Fax 313374,**
**info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo**